# Vinnarar av Shell Helix Grand Prix 2003

**Síðan Formel 1 kappkoyringin 2003 byrjaði tann 9. mars, hevur Føroya Shell boðið øllum starvsfólkunum á føroysku bilafyritøkunum at vera við til Shell Helix Grand Prix 2003 kappingina. Vinnararnir blivu funnir mikudagin 15. oktober**

TÍÐINDASKRIV



*Vinningarnir vórðu drignir mikudagin 15. oktober 2003. Til dráttin vóru frá Føroya Shell: Erling í Liða, Sølu- og marknaðarleiðari, Victor Carlsen, sølumáður, Vónbjørt Sørensen, skrivstovukvinna, og Magnus Gunnarsson frá Sosialinum, sum dró vinningarnar.*

*Mynd: Maria Olsen*

Í sambandi við Formel 1 kappkoyringina í ár hevur Føroya Shell skipað fyri stóru kappingini Shell Helix Grand Prix 2003 í Føroyum. Kappingin var fyri øll starvsfólk á føroysku bilasølunum og bilverkstøðunum kring landið.

Líknandi kapping hevur eisini verið á donskum bilverkstøðum.

Kappingin var ókeypis, og starvsfólkini skuldu bert ringja til eitt ávíst telefonnummar og svara trimum ymiskum spurningum. Fyrsti og annar spurningur vóru altíð teir somu. Fyrsti spurningur var: *Hvat nummar bleiv Michael Schumacher í dag?*, og annar spurningur: *Hvat Formel 1 -team er fremst í kappingini í løtuni?*. Triði spurningur hevði nakað við olju at gera. Hesir spurningar vóru ongantíð teir somu, sum t.d.: *Hví er tað altíð eitt gott hugskot at kanna oljuna á motorinum?* ella: *Hvør koyring slítur mest uppá motorin?*.

Umframt fleiri smáar vinningar sum vóru drignir eftir hvørt einstakt Grand Prix, so vórðu høvuðsvinningarnir drignir mikudagin 15. oktober. Høvuðsvinningurin var ein ferð til Formel 1 í San Marino í Italia, sum er "heimabanin" hjá Ferrari, so har verður eisini vitjað á Ferrari verksmiðjuni í Maranello. Annar vinningur var tvey pláss á einum "koyriteknískum skeiði" har teir báðir vinnararnir millum annað sleppa at koyra í einum Ferrari "rasara". Triði vinningur var fimm Ferrari/ Shell jakkar.

Kappingin snúði seg um at fylgja Formel 1 kappingini í 2003 og innan 24 tímar aftaná hvørt Grand Prix at svara teimum trimum spurningunum pr. telefon. Har fekk tann sum ringdi beinanvegin at vita, um hann hevði vunnið ein minni vinning. Somuleiðis vórðu stig spard upp til teir størru vinningarnar, sum blivu drignir 15. oktober.

Tveir teir fyrstu spurningarnir góvu 100 stig hvør, og tann triði spurningurin sum hevði nakað við olju at gera, og var lærandi gav 200 stig, t.vs. fult stigatal fyri hvørt Grand Prix var 400 stig. Kappingin fevndi um 11 Grand Prix, og sostatt var tað mesta tú kundi fáa 4400 stig.

Tey sum vóru við í lutakastinum um høvuðsvinningin vóru bert tey, sum høvdu fult stigatal. Tey sum sluppu við í lutakastið um 2. vinningin, vóru tey við 4200 - 4400 stigum. Tey sum vóru við í lutakastinum um 3. vinningin, vóru tey við 4000 - 4400 stigum.

Vinnarin av ferðini til San Marino var
- H.J. Kollsker, Bilverkstaðið v. H.J. Kollsker, á Hjalla

Vinnararnir til koyriteknískt skeið vóru
- Tummas Vilhelm, P/F Meinhardt Arge, Tórshavn
- Ásmund Joensen, P/F Johs. Berg, Tórshavn

Vinnararnir av Ferrari/Shell jakkum vóru:
- Poul Johan Dahl, P/F Wenzel, Tórshavn
- Mogens Petersen, SP/F Mogens Petersen, Trongisvágur
- Tom Villy Magnussen, SP/F Oyri, Vágur
- Jákup Midjord, SP/F Mogens Petersen, Trongisvágur
- Magnus Kristensen, SP/F Mogens Petersen, Trongisvágur

Leggjast kann afturat, at Formel 1 í 2003 var eitt gott ár fyri Ferrari og Shell, har Michael Schumacher bleiv heimsmeistari og Ferrari samstundis vann heimsmeistaraheitið fyri lið samanlagt. Til Formel 1 kappingar hevur Shell latið brennievni til Ferrari í mong ár, samstarvið byrjaði í 1950. Áliga hevur Ferrari brúk fyri, at Shell letur 300 oljuveitingar á 24 koyribreytum í 15 ymiskum londum.

# Bjarni Djurholm mótsegði sær sjálvum

FERÐSLUVIÐURSKIFTI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leirvíkingar halda tað vera undarligt, at bert ein miljón verður sett av til forkanningar til tunnil ár 2005, tá ið landsstýrismaðurin samstundis sigur, at verður vegur bygdur í staðin, kann arbeiði byrja so gott sum beinanvegin.

- Vit skilja ikki, hví forkanningarnar til tunnilin skulu bíða so leingi, tá ið peningur eftir øllum at døma kann útvegast til vegagerð, sigur Filip Hansen

370 leirvíkingar skrivaðu undir borgarakravið um, at ferðsluviðurskftini í Leirvík verða loyst, áðrenn Norðoyatunnilin letur upp. Hetta svarar til 75% av teimum, sum seinast vóru á vali í Leirvík.

Mánadagin handaðu teir báðir, sum tóku stig til at savna undirskriftirnar, Filip Hansen og Sørin Lisberg, skrivið saman við undirskriftunum til formannin í Leirvíkar kommunu, Sjúrð Eliasen og landsstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm.

Tá ið Sjúrður Eliasen tók ímóti undirskriftunum, segði hann, at Leirvíkar bygdarráð fer at taka skrivið til eftirtektar og viðgera tað á fundi. Bygdarráðið fer eisini at taka støðu til, hvørji stig skulu takast.

## Bjarni kommenteraði

Seinni hendan dagin, sum skrivið varð handað Leirvíkar kommunu, handaðu Filip og Sørin eisini landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm, skrivið saman við undirskriftum.

- Bjarni vildi líkasum kommentera málið beinanvegin. Skiltu vit hann rætt, segði hann, at skal loysnin uppá ferðsluviðurskiftini í Leirvík framskundast, fáa leirvíkingar ikki tunnil, men ein veg í staðin.

Filip vísir á, at Bjarni minti á løgtingssamtyktina um tunnil og segði, at ein milj. krónur verða settar av til forkanningar ár 2005.

- Bjarni segði eisini, at verða ferðsluviðurskiftini í Leirvík loyst við einum vegi heldur enn tunli, kann arbeiði fara í gongd næstan beinanvegin.

Hann heldur, at hesi úttalilsi kunnu tykjast mótsigandi.

- Tað, sum leirvíkingar í fyrsta lagi vilja, er, at skjøtil verður settur á, soleiðis at fólk síggja, at ein loysn stundar til.

Filip heldur, at er peningur tøkur at byggja ein veg fyri beinanvegin, er torført at skilja, hví leirvíkingar skulu bíða heilt til ár 2005, áðrenn ein milj. krónur kunnu nýtast til forkanningar til tunnil.

- Hetta fáa vit ikki rættiliga at hanga saman, leggur hann dent á.

## Ætlanin óneyv

Filip sigur, at leirvíkingar vildu ógvuliga fegnir, at ein partur av tí peningi, sum sambært Bjarna Djurholm kann útvegast til vegagerð, verður brúktur beinanvegin til tunnilsætlanina, soleiðis at fólk kunnu liva í vissuni um, at bøttu ferðsluviðurskiftini ikki liggja alt ov langt frammi.

- Vit halda, at tíðarætlanin við tunlinum, soleiðis sum landið liggur, er ógvuliga óneyv, og tí kenna fólk seg heldur ikki trygg við viðurskiftini.

Filip vísir á, at eitt er samtyktin um hasa einu miljónina.

- Men ein slík samtykt kann jú altíð broytast við eini nýggjari samtykt.

Hann leggur dent á, at leirvíkingar als ikki skilja, hví bíðast skal so leingi eftir forkanningunum.

- Høvdu týðilig tekin verið um, at myndugleikarnir ætla at loysa tey viðurskifti, sum verða, tá ið Norðoyatunnilin letur upp, høvdu vit verið tryggari við umstøðurnar.

## Fólk eru glað

Filip heldur annars, at fólk sum heild eru ógvuliga glað, nú ljós er varpað hetta mál.

- Eg haldi, at viðurskiftini hjá okkum her í Leirvík hava verið alt, alt ov lítið frammi við atliti til Norðoyatunnilin og ta øgiligu ferðslu, sum verður gjøgnum Leirvíksbygd, tá ið tunnilin letur upp, sigur Filip Hansen at enda.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Andrew Godtfred 90 ár



Í dag fyllir Andrew Godtfred 90 ár. Fyrst í sjeytiárunum flutti hann til Havnar úr Vági, har hann tá í mong ár hevði selt olju fyri Shell.

Sum ungur sigldi Andrew fleiri ár við Norðfarinum, sum Jóhan, bróðir hansara, førdi. Andrew var motorpassari og fór á motorpassaraskúla, men tók síðani stýrimansprógv í Havn og skipsføraraprógv í Keypmannahavn. Hetta var fyri kríggið, og heimafturkomin fór hann at føra Silver Spray, sum pápi hansara átti.

Foreldrini hjá Andrew vóru Kristina og Jóhan Andreas Godtfred, vanliga nevndur Dias á Heyggi. Tey vóru bæði úr Porkeri, men búsettust í Vági, har Dias hevði skip, fiskavirki og handil.

Andrew sigldi øll krígsárini og nøkur ár eftir tað, men fór so í land og var leiðari á hvalastøðini í Lopra, áðrenn hann gjørdist oljusølumaður. Tað var fyrst í fimmtiárunum, og oljusøluna hevði hann tey næstu umleið 20 árini.

At selja olju var at hava handil, sum ongantíð var stongdur. Mia, kona hansara, passaði telefonina, og Andrew koyrdi olju og hevði roknskapin. Mangan uppringd á hálvari nátt, tí ein oljufýring var slóknað, tangin tómur ella okkurt skipið skuldi bunkra.

Smølu vegirnir í sunnaru helvt av Suðuroynni í fimmti- og sekstiárunum kundu vera hættisligir. Serliga at fara um Hestin í kavaroki. Men ikki vildi Andrew, at nakar skuldi sita kaldur. Nei, so heldur biðja mann koma við sær, sum kundi hjálpa honum at grava, um oljubilurin stóð fastur á veg til Sumbiar. Slíkir túrar gjørdust drúgvir.

Tá ið tey fluttu til Havnar, fór Andrew til skips aftur. Hann fiskaði við nótaskipunum hjá Eileri Jacobsen og var stýrimaður við Kubabátunum hjá Skipafelagnum á vaktarhaldi við oljuboripallarnar í Norðsjónum. Seinni avloysti hann sum tollari um summarið og var náttarvakt á Tórshavnar Skipasmiðju. Andrew var 79 ára gamal, tá hann hevði sín seinasta arbeiðsdag. Mia fór eisini út at arbeiða, fyrst í køkin á Hotel Hafnia og síðani á Frímerkjadeildina.

Mia kom til Vágs sum smágenta. Foreldur hennara vóru Inga og Gunnar Danielsen úr Søldarfirði, og tey fluttu suður, tí hann førdi skip hjá J. Dahl á Gørðunum.

Mia og Andrew giftust í eini daprari tíð. Í november 1940 gekk seinni heimsbardagi á øðrum ári, og føroyingar mistu fólk og skip. Hóast Andrew førdi Silver Spray manga vandaferð millum londini, komu skip og manning tó aftur í øllum góðum.

Mia og Andrew fingu fýra børn. Andrew, sum búði í Havn, doyði í 1999. Gunnvør býr í Næstved, Bergur býr í Leynum og Bogi í Havn.

Tey, ið vilja heilsa uppá Andrew, eru vælkomin í føðingardag á Hotel Hafnia fríggjadagin 17. oktober frá kl. 15-18.

## Ivan Carlson 50 ár



Í dag fríggjadagin 17. oktober fyllir Ivan Carlson leiðari á Loranstøðini á Eiði 50 ár.

Ivan er av Tvøroyri, sonur Oliviu og Hákun Carlson.

Hann er útbúgvin svakstreymsverkfrøðingur og arbeiddi á eini Loranstøð í Grønlandi í nøkur ár.

Hann kom til Loranstøðina á Eiði í 1983, og tá leiðaraskifti seinni fór fram har, bleiv Ivan settur sum leiðari av støðini. Seinni tá leiðarin fyri allar vitarnar í Føroyum, Leon Heinesen, fór frá fyri aldur, bleiv Ivan eisini settur sum leiðari fyri vitarnar.

Manningin á Loranstøðini eru í starvi hjá Farvandsvæsenet í Danmark.

Ivan er giftur við Alice, sum er donsk, tey tey búgva á Eiði og eiga fýra synir: Asbjørn, Birgir, Christian og David.

### Dagurin

**17. oktober. Florentinus,** deyður umleið 1525. Biskupur í Orange í Fraklandi; kendur úr søguni av fleiri kirkjufundum, har hann hevur verið við, men annars vita teir einki um hann at siga.

*Mikkjal á Ryggi er føddur hendan dagin í 1879.*

# Heimamissiónin sangskeið í 25 ár

**Ein Noregsferð í 1975 har Alli og Maria Hansen av Argjum, saman við øðrum úr streingjakórinum í Havn vóru á einum norskum sangskeiði, var íblásturin til sangskeiðini hjá Heimamissiónini sum byrjaðu í 1978**



*Sangskeiðið 2003 í Leguhúsinum í Nesvík*

25 ár eru liðin síðan sangskeiðið hjá Heimamissiónini varð hildið fyri fyrstu ferð.

Ein Noregsferð í 1975 har Alli og Maria Hansen av Argjum, saman við tveimum øðrum úr streingjakórinum í Havn vóru á einum norskum sangskeiði, var íblásturin til hesi sangskeið hjá Heimamissiónini sum byrjaðu í 1978.

Fyrsti kórleiðararnir vóru danin Ole Weber og norðmaðurin Trond Andersen.

Tey fyrstu 16 árini var skeiðið hildið í ymsu bygdunum í Føroyum. Seinastu árini hava skeiðini verið í Leguhúsinum í Nesvík.

Øll árini hava útlendskar kórleiðarar leitt hesi skeið. Í ár er tað norðmaðurin Jon S. Lotterud, sum leiðir kórið. Hann var eisini her í 1997.

Yvir tvey hundrað fólk teknaðu seg til sangskeiðið í ár, sum byrjaði sunnukvøldið 12. oktober. Kórið venur umleið 4 tímar hvønn dag. Harafturat eru eisini bíbliutímar og møti á skránni, har eru øll vælkomin.

Ymiskt verður fyri børnini, eitt nú barnakór.

Sangskeiðið endar við konsert í Fríðrikskirkjuni á Toftum leygardagin 18. oktober kl. 17.00.